## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 10.06 | B36-NSÍ | Petur Reinert |
| 10.06 | GÍ-AB | Lars Müller |
| 10.06 | Skála-EB/S | Páll Augustinussen |
| 10.06 | B71-HB | Dagfinn Olsen |
| 10.06 | VB/S-KÍ | Rúni Gaardbo |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 09.06 | TB-LÍF | Bárður Mortensen |
| 09.06 | HB-ÍF | Regin Egholm |
| 09.06 | FSV04-B68 | Eiler Rasmussen |
| 09.06 | B36-NSÍ | Jan Skoradal |
| 09.06 | KÍ-SÍ | Vinjard Dam |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | ÍF-B36 | Berint Andreasen |
| 10.06 | B68-Skála | Marner Olsen |
| 10.06 | Fram-GÍ | Magnus í Króki |
| 10.06 | KÍ-MB | Kristian Sofus |
| 10.06 | FSV04-EB/S | MB |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | EB/S-AB | Jóhan P. Michelsen |
| 10.06 | B36-GÍ | Rói Jacobsen |
| 10.06 | NSÍ-KÍ | Eugen Voda |

B36 – NSÍ:

# NSÍ síðstu ferð í Havn



## Við – ikki við

**Skaddur:** Danny Rasmussen (brotið hondina)
**Leikbann:** Jákup Martin Joensen og Rani D. Christiansen
**Við aftur:** Jón Nielsen (ryggskaða) og Magnus Poulsen (vøddaskaða)

**Ivasamur:** Amed Davy Sylla
**Við aftur:** Ovi Nysted

**Allir tøkir**

**Skaddur:** Sorin Anghel (knæskaða)
**Leikbann:** Rafal Kwiecinki
**Við aftur:** Arnbjørn Theodor Hansen (beinbrot)

**Leikbann:** Niclas Niclasen
**Ivasamir:** Sámal Joensen (vøddaskaða), Áslakur R. Petersen (vøddaskaða), Hans Jørgen Djurhuus (knæskaða), Símun Louis Jacobsen (hælurin)

**B36 og NSÍ hava bæði 24 stig, eitt minni enn oddaliðið EB/Streymur. Ársins seinasta vitjan hjá teimum stríputu í Gundadali verður sunnudagin, har ein sigur kann vera beinleiðis atgongdin til oddasessin**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Oddaliðið í Formuladeildini eitur EB/Streymur. Teir hava 25 stig eftir 11 umfør. Í hølunum á teimum koma tvey lið, sum bert hava eitt stig minni enn felagsliðið úr Sundalagnum. Hesi eru B36 og NSÍ og sunnudagin bresta tey saman í stórdysti í Gundadali.

Hóast jøvn í stigum, so eru úrslitini ikki heilt eins. B36 hevur sjey sigrar í skjáttuni, tríggjar javnleikir og eitt tap. Teir eru liðið, sum hevur tapt fæst dystir og har fæst mál eru farin í gjøgnum, bert átta eru tey í tali.

NSÍ hevur hinvegin vunnið átta dystir og tapt tríggjar. Ongan dystin hava teir fingið javnan. Hjá teimum eru tíggju mál farin ígjøgnum, meðan teir hava eins og B36 skotið 20 mál.

Við hesum havandi í huga, átti at borið til at fingið ein javnan og ikki minst spennandi dyst, og hesum tekur liðformaðurin hjá NSÍ eisini undir við.

– Hetta er ein stórur dystur, eingin ivi um tað, men fyri so vítt er hann ikki týdningarmiklari enn ein ímóti VB/Sumba ella AB, sigur Óli Hansen. Rætt hevur hann í hesum, tí líkamikið hvat, so gevur ein sigur ikki meiri enn trý stig.

Kortini eiga vit ikki at gloyma psykologiska týdningin av dystinum, sum ikki er lítil. Ein møguligur vinnar i fær hasi góðu trý stigini millum seg og sunnudagsins mótstøðulið. Møguliga yvirtekur hann eisini oddasessin, um EB/Streymur snávar móti Skála. Og fyri at venda aftur til sálarlig týdningin, so hevur tað uttan iva týdning, tá kappingin líður móti endanum, og kappingin um einstøku stigini er munandi harðari enn nú, og liðini hittast aftur við Løkin. Um NSÍ tá tvær ferðir hevur vunnið sannførandi á B36, ella um ársins næsti landskappingardystur var ein lítil svipsari

## VB/Sumba kann

Hóast hagtølini ikki spæla á vøllinum sunnudagin, so vísa hesi ofta ein tendens ella trend, sum kann geva góða hylling á, hvussu liðini standa seg. Og her kann VB/Sumba heinta nakað av sjálvsáliti undan dystinum móti KÍ. Tí hóast KÍ í fjør vann ikki minni enn 7-1 í Vági, so hava teir tað aloftast trupult á staðnum. Soleiðis skalt leitast seks ár aftur, áðrenn vit aftur finna ein KÍ-sigur. Hartil staðfesta hagtølini, at B36 hevur takið á NSÍ í Gundadali. Talvan sýnir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá tey hava dystast í tilsvarandi dystunum í bestu deildini seinastu 10 árini.

-mørk